Jóhan og Gunnar. Jóhan er 80 ára gamal í dag og er búsitandi í Havn, meðni hinir báðir beiggjarnir eru báðir deyðir. Alexandra var ættað av Skála, men kom at vaksa upp í Havnini hjá Jóhannu og Óla Tauser, sum komu at vera

Jóhannes tók einaferð soleiðis til: "Tað er torførari at fiska menniskju enn tosk."

eins og foreldur fyri Alexandru. Tey vóru barnleys. Jóhanna var ættað úr Hovi og Óli var úr Havnini. Mamma Óla var úr Havn meðan pápin var týskari, har navnið Tauser kemur frá.

Jóhannes kallaðist Poulsen, men av tí, at tað vóru fleiri, sum kallaðust Jóhannes Poulsen, og nøvn og postur kom mangan í bland, so vórðu tey bæði samd um, av praktiskum orsøkum, at tey skuldu taka familjunavnið hjá fosturforeldrunum hjá Alexandru. Tí komu tey at eita Tauser. Navnið Tauser kemur upprunaliga úr Týskalandi til Føroyar í seinnapartinum av 19. øld, tað var pápi Óla, sum kom við navninum hendavegin.

Sjómaður

Sum flestu av hansara javnaldrum, tá í tíðini, so kom hansara arbeiðspláss at verða tað nógva á sjónum, og onkrar túrar kundi hann verða rættuliga leingi burtur frá heimi og familju. Hann sigldi við skipum sum Galway, Lítlu Emmu og Slatrinum. Tíðrnar í Føroyum vórðu ringar í fimtiárunum og tí kundi eisini vera torført at fáa skipskjans, tí keypti hann sær, í 1954, egnan bát, sum hann róð út við út frá Havnini og sum varð hansara livibreyð inntil hann og familjn flutti til Danmarkar at búgva fimm ár seinni. Hann var ein av útróðrarmonnunum í Havn, sum setti ein serstakan dám á Kongabrúnna í Havn, tá hann kom við veiðuni og kastaði smáar og stórar toskar upp á bryggjuna, soleiðis, at Havnakonur kundu keypa feskan fisk og borðreiða við nýgjørdum knettum ella frikadellum fyri manninum, tá hann kom til døgurða. Tá vóru Havnarkonurnar heimagangandi, og menninir og skúlabørnini komu heim til døgurða á miðdegi.

Gongur regluliga á møti

Alexandra gekk á møti í Frelsunarherinum í Havn, og tað hendi av og til, at hon fekk hann at koma við sær á møti. "Eg gekk leingi og ynskti mær at vita hvussu eg kundi koma inn í Guds ríki, men Djevulin royndi á ymiskan hátt at fáa meg at hugsa, at tað var við egnum gerningum, at ein mátti arbeiða seg verdugan til Guds ríki," sigur Jóhannes.

Ein dagin stóðu hann og Palle Egholm og veltu á trønni hjá einum, sum kallaðist Tummas í Fjósi. Palle var ein trúgvandi maður og savnaðist við pinsunum í Havn. Teir komu í prát, og Palle spyr, um hann er frelstur. Tá svaraði Jóhannes ógvuliga avgjørdur: "Eg eri ikki frelstur, men tað vil eg

Hansara fyrsti vitnisburður var fyri bindiklubbanum hjá konuni: "Møti í kvøld komi eg aldri at gloyma, í kvøld bleiv eg frelstur, tí vit kunnu koma inn í Guds ríki uttan at gera nakað sjálvi,……."

bestemt verða!" Um hetta mundið er Jóhannes 32 ára gamal.

Palle bjóðaði honum heim til sín, har hann og konan greiddu honum frá frelsuni, bóðu fyri honum og lósu m.a. úr Rómbrævinum kapitul 8. Jóhannes sigur, at hann minnist serliga ørindi 1 í hesum kapituli: "So er nú eingin fordøming fyri tey, sum í Kristi Jesusi eru." "Eg bleiv ikki frelstur um hetta mundi, men aftaná hetta fekk eg rættuligan hug til at koma til møtir."

Aftaná samtaluna við Palla Egholm og konuna kom vend í hjá Jóhannesi viðvíkjandi møtum. Tey næstu tvey árini var hann ofta at síggja til møtir bæði í Pinsameinigheitini, meinigheitshúsinum (gamla meinigheitshúsið) og í Ebenezer, (gamla Ebenezer) men av náttúrligum orsøkum kom hann mest til møtir í Frelsunarherinum, tí har kom kona hansara, Alexandra. "Eg var nú av sonnum farin at leingjast eftir friði við Gud, eg var ein leitandi syndari, sum vildi hava vissu fyri hvussu ein kann koma inn í Guds ríki," sigur Jóhannes.

Hóast hann longdist eftir friði við Gud, so fór hann aftur og aftur av møtunum uttan at hava fingið frið. Hann fortelur, at undir einum eftirmøti í Frelsunarherinum kom Addaba til hansara fyri at tosa við hann um frelsuna, "men eisini hetta kvøldið fór eg av møtinum ófrelstur."

Ein leitandi syndari og ein leitandi frelsari

Jóhannes var 32 ára gamal, tá Palle spurdi hann, um hann var frelstur, men ikki fyrr enn 2 ár seinni, 34 ára gamal, í 1936, upplivdi hann eina persónliga freslu. Hetta var ein mikudag og hann var farin ein túr oman á Kongabrúnna. Har møtir hann tveimum offiserum úr Frelsunarherinum, Nicolai Gundersen og Kronberg Hansen. Teir koma allir tríggir í prát, og tá teir spyrja Jóhannes, hvussu hann hevur tað, svarar hann, at hann hevði tað ikki gott.

Tað, sum leikaði á hjá Jóhannesi var frelsuspurningurin, og nú var tað av álvara vorðið ódnarveður í sál hansara, júst soleiðis sum hann og skipsfelagar hansara upplivdu ódnina á páskum í 1917 tá teir sigldu inn í eina stilla vík. Nú longdist Jóhannes eftir at sál hansara kundi leggja inn í eina stilla havn.

Tá ein leitandi frelsari søkir eftir einum leitandi syndara, so finna teir hvønn annan, og júst tí var tað, at Harrin hevði sent hesar tveir menninar á hansara leið niðri á Kongabrúnni í Havn. Tá teir skiltu, at hann ikki hevði tað so gott, so bjóðaðu teir honum at koma á soldátarmøti hetta sama kvøldi.

Hetta kvøldið, tá Jóhannes fór á soldátarmøti í frelsunarherinum, hendi nakað í lívi hansara, sum broytti hann fullkomiliga. Ein

"Eg sá Jesus líðandi fyri meg og at hann við sínum líðilsi hevði betalt fyri mína fullkomnu frelsu……."

kvinna fór upp á pallin at syngja, og sangurin, sum hon sang var á donskum og tað eina ørindi ljóðaði soleiðis:

"Jeg gav mit liv for dig,
mit hjerteblod udflød,
at frelst du skulle bli`
og vakt til liv fra død".

Sangurin er skrivaður av bretanum Frances R. Havergal. Týddur til føroyskt av V. Danielsen og er nr. 636 í Songbók Guds Fólks: "Títt lív, tað gavst tú mær….." Sangurin hevur fýra ørindi.

Tað var Amy Andreassen, sum sang hetta kvøldið. Sangur hennara kom frá hjartanum og fór beinleiðis í hansara hjarta. Jóhannes fall í grát, har hann sæt í salinum. Hann reisti seg og fór fram til bodsbonkin har hann legði seg á knæ og kallaði á navn Harrans á donskum: "Himmelske far, tag mig som jeg er!!"

Jóhannes sigur, at tað var ikki fyrrenn hann reisti seg uppaftur frá bodsbonkium, at hann upplivdi frelsugleðina. Vit lata Jóhannes sjálvan greiða frá hvat hendi hesa løtuna: "Tá eg reisti meg, var eg sum eitt nýtt menniskja - eg sá Jesus líðandi fyri meg og at hann við sínum líðilsi hevði betalt fyri mína fullkomnu frelsu – eg skal einki gera fyri at koma inn í Guds ríki, Jesus gjørdi alt við sínum líðingum – hetta møti gloymi eg ongantíð."

Vitnar sama kvøldið

Hann og Alexandra høvdu bæði ætlað sær á møti hetta kvøldið, men um tað mundi tey skuldu fara komu konurnar í bindiklubbanum at vitja og tí fór Jóhannes einsamallur á møti. Jóhannes var spentur at koma til hús hetta kvøldi, tí hann vitsti, at bindiklubburin var ikki enn farin til hús. Hann fór beinleiðis innar í stovuna, har tær fimm bindiklubbakonurnar sótu, og hann vitnaði fyri konu síni Alexandru og hinum konunum: "Møti í kvøld komi eg aldri at gloyma, í kvøld bleiv eg frelstur, tí vit kunnu koma inn í Guds ríki uttan at gera nakað sjálvi, tí okkara Himmalski pápi hevur gjørt alt fyi okkum í Jesusi!"

Hetta var hansara fyrsti vitnisburður, men so sanniliga ikki hansara einasti, tí hann gjørdist seinni eitt íðið vitni fyri sín Harra og Frelsara innan Frelsunarherin, bæð á Vaglinum í Havn og á gongugøtuni í Helsingør, har hann seinni kom at búgva. Longu tríggjar vikur eftir hetta vórðu hann og Alexandra vígd til soldátar í frelsunarherinum.

Jóhannes sigur, at Djevulin gjørdi mangan álop á hann eftir at hann var komin til trúgv og royndi at fáa hann at ivast í frelsuni: "Djevulin royndi mangan at billa mær inn, at tað ikki er nokk at trúgva, men at eg eisini mátti gera nakað sjálvur." Jóhannes sigur víðari, at tá hesi álopini komu á hann, so styrkti hann seg sjálvan við at lesa í Ef.1,3-8v. har tað m. a. stendur, at vit eru útvald áðrenn grundan heimsins, at vit hava fingið sonarkor hjá Gudi og at vit hava fingið endurloysing og fyrigeving syndanna við blóði Kristusar.

Tað var skjótt greitt fyri mær, undir samveruni við Jóhannes, at tekstbrotið í Ef.1,3-8 var hansara yndistekstur í nýggja testamenti. Hann segði mær, at hann mintist so ómetaliga væl ein norskan prædikumann, sum talaði nógv í Ebenezer, sum kallaðist McKinnon. "Eg minnist væl, at hann tosaði ofta út frá Efesusbrævinum og at hann einaferð segði: "Hvis vi ikke havde Efesusbrevet så var vor bibel fattig!" Kanska eru tað onkur dýrabar livandi sáðkorn úr talunum hjá McKinnon, út frá Efesusbrævinum, sum enn liva og gera gott í sálini hjá hesum aldrandi trúgvandi manni. Hesin norski prædikumaðurin var nógv í Føroyum og ferðaðist ímillum samkomurnar. Hann var kendur fyri at vera ein, sum ofta talaði um sannleikar í Efesusbrævinum. Hann skrivaði eina bók um Efesusbrævið, sum eg hevði tað gleði at kunna geva Jóhannesi og sum hann eisini var glaður fyri at fáa.

Meðni eg sæt og tosaði við henda gamla Harrans tænara, so kendi eg tað heilt greitt, at tað júst eru hesir sannleikarnir, sum hava givið honum tað størstu gleðina í lívinum. Tað, sum hevur havt stórsta týdning fyri Jóhannes, alt lív hansara, er, at hann í líðing og blóði Jesusar eigur eina persónliga endurloysing og fyrigeving. Tað hevur verið hansara stóra lívsgleði at bera vitnisburðin um Jesus út í sangi og orðum. Jóhannes er eitt talandi prógv um sannleikan í Sálm. 92,13-16v. har tað stendur, "…….at hin rættvísi grør sum pálmin og at enntá gráhærd eru tey sevjurík og grøn at vitna um Harran……"

Vildi ikki oman á Vaglið

Tað gekk kortini nakað av tíð, frá tí hann kom til trúgv og til hann av álvara byrjaði at vitna alment. Í fyrstuni føldi hann seg ikki at vera til reiðar at stíga fram alment. Einaferð, tá Håkon Dahlstrøm, sum um tað mundi var loytnantur í Frelsunarherinum, bað hann koma við oman á Vaglið at hava útimøti, var Jóhannes ógvuliga avgjørdur í sínum svari og takkaði nei. Men tá hann hoyrdi sangin og horntónleikin frá "frelsenshær," meðni tey marsjeraðu eftir Havnargøtum oman á Vaglið hetta kvøldið, opnaði hann sína bíbliu, og kom at lesa í Matt.28,19-20v. Tá komu hesi orðini so sterkt til hann: "Far nú út, og eg skal vera við tær!" Jóhannes sigur, at hann var við tað sama greiður yvir, at her var talan um at fara út við evangeliinum.

"Eg veit ikki hvussu tað er við tær, men eg eri frelstur av náði."

Hetta sama kvøldið gjørdi Jóhannes sum Esaias profetur gjørdi, (Es.6,8-9) tá hann var kallaður at fara út. Jóhannes var lýðin og fór við tað sama oman á Vaglið og stillaði seg á fyrsta sinni saman við Frelsunarherinum til útimøti. Hann minnist hvussu glaður í Dahlstrøm var tá hann sá hann koma, tá segði Dahlstrøm við hann. "Nå, du kom alligevel." Håkon Dahlstrøm kom at hava avgerandi týdning fyri andaliga lívið hjá Jóhannesi, og teir hava samskiftað hvør við annan, ígjøgnum alt teirra lív.

Fekk ikki afturhald

Aftan á hetta útimøti á Vaglinum kom vend í hjá Jóhannesi, hann fekk reint og slætt ikki afturhald at vitna, og hann fór eisini at spæla og syngja fyri Harran. Jóhannes er kønur við harmonikuni. Tá hann gekk í barnaskúlan á Eiði dámdi honum best sangtímarnar og hann lærdi seg at spæla á harmoniku. Hetta vísti seg at koma honum ríkiliga til góðar seinni í lívinum, tá hann fór at syngja og spæla fyri Frelsara sín.

Hann gjørdist nú virksamur í frelsunarherinum, saman við konu síni Alexandru, har hann gleddi áhoyrarnar, bæði í salinum

Framhald á næstu síðu

Hann varð 105 ár fríggjadagin 23. februar

Er ikki farin á stovn at búgva, men býr framvegis heima í egnari íbúð. Tvær døtur hyggja til hann hvønn dag. Hevur eina góða heilsu og kemur framvegis úr songini. Fylgir við hvat hendir rundan um hann. Hjálpir til í húsarhaldinum við at knoða deiggj tá bakast skal og elta knettir. Hjálpir dótturini við at leggja klæðir saman. Inntil fyri heilt nýliga fekst hann við at rippa húkar. Jóhannes er ein persónligur kristin. "Eitt gott sinnalag við nógvum smíli, sunnum mati, arbeiðsgleði og ongum tubbaki er ein góð uppskrift upp á eitt langt lív," sigur Jóhannes.